# Nýggjur fotohandil í Klaksvík

*Í komandi viku letur ein nýggjur fotohandil upp í Klaksvík. Handil samstarvar við donsku ketuna PhotoCare*



EYÐUN KLAKSTEIN

Klaksvíkingar fáa í næstu viku nýggjan fotohandil. Handilin letur upp í hølum á Klaksvíksvegnum, og hevur fingið navn eftir donsku ketuni, sum hann samstarvar við, Photo Care.

Brøðurnir Finn og Jógvan Johannesen royna í hesum døgum at fáa alt upp á pláss, so handilin kann lata upp.

Ætlanin var, at handilin skuldi lata upp í hesi vikuni, men teir bíða eftir einum luti til eina maskinu, og so leingi teir ikki kunnu brúka allar maskinurnar, vilja teir ikki lata handilin upp.

– Vit ætla at leggja okkum eftir at veita kunduum eina góða tænastu, sigur Finn Johannesen.

PhotoCare fer at selja fototól, filmar og alt annað, sum hoyrir heima í eini fotohandli. Handilin fer eisini at framkalla filmar fyri fólk, og millum tænasturnar er eisini tann vanliga tímatænastan fyri framkalling.

PhotoCare er ein keta við umleið hálvthundrað handlum í Danmark. Ketan ger millum annað sínar egnu bøkur um, hvussu fólk kunnu fáa sum mest burtur úr sínum myndum, og hesar bøkur verða eisini at fáa í handlinum í Klaksvík.

*Finn Johannesen væntar, at nýggi fotohandilin letur upp í næstu viku*



*Hjúnini Hergerð og Eiler Samuelsen hava nú selt bakaríið hjá sær. Mynd: JH*

# Nú gevst Eilers Bakarí

Hjúnini Eiler og Hergerð Samuelsen hava rikið bakarí í Klaksvík í nógv ár, men nú gevast tey.

Bakaríið, sum liggur í Nólsoyar Pálsgøtu, skal framyvir rekast av einum øðrum bakara í Klaksvík, Símun Akursmørk, sum frammanundan hevur bakaríið Hjá Símun.

Mikudagin var móttøka í bakarínum hjá Eileri, og har stukku nógv fólk inn á gólvið at siga farvæl til Eiler og Hergerð.

Símun Akursmørk tekur yvir 1. juli, og roknað verður við, at flestu av arbeiðsfólkunum, sum hava arbeitt hjá Eileri, halda fram á bakarínum, nú Símun tekur yvir.

# Norskur stuðul til fullveldi

*FULLVELDI. Norskur ungdómur heitir á norsku stjórnina um at hjálpa Føroyum at gerast sjálvstøðugt land*

HØGNI MOHR

Eitt av størstu politisku ungmannafeløgunum í Noreg, Landsfelag Mið-Ungdóma, avgjørdi um vikuskiftið at veita føroyingum sín fulla stuðul í stríðnum fyri føroyskum fullveldi.

Mið-Ungdómurin stuðlar norska Miðflokkin, sum var í stjórn saman við teimum kristiligu og Vinstraflokkinum. Hendan stjórnin fór frá í mars í ár. Síðani norski Javnaðarflokkurin við Jens Stoltenberg á odda tók við stjórnarvaldinum í Noreg, hevur Miðflokkurin verið í andstøðu.

**Eingin ímóti**

Per Holmen, starvsmaður í norska Miðflokkinum, væntar, at Miðflokkurin fer at taka støðu í málinum, men hann veit ikki nær hendan støða verður tikin.

- Vit fylgja væl við, hvat hendir millum Danmørk og Føroya. Vit eru ímóti ES, og hava altíð stuðlað norðurlendsku loysnina; við serligum atliti til nærdemokratiið. Men eg veiti ikki, hvør almenna hugsanin hjá flokkinum er í hesum máli, sigur Per Holmen.

Talsfólk í ungmannafelagnum siga við Sosialin, at alt fundarfólkið tók undir við yvirlýsingini, sum stuðlar føroysku ætlanini um sjálvræði.

**Yvirlýsingin:**

Mið-Ungdómur stuðlar føroyskum sjálvræðisstríði.

Landsfundurin hjá Mið-Ungdóminum mælir stjórnini í Stórtinginum til at stuðla Føroyum í stríðnum fyri sjálvræði.

Føroyar samráðast við Danmørk um, hvussu skiftið til einar sjálvstøðugar Føroyar skal vera. Men donsku treytirnar eru somikið harðar, at føroyskt sjálvræði verður ógjørligt.

Mið-Ungdómurin heldur, at Noreg eigur at stuðla føroysku krøvunum og hjálpa Føroyum at gerast sætta sjálvstøðuga Norðurlandi.

# Prodi vitjar í Grønlandi

Formaðurin fyri ES-nevndina, Romano Prodi, vitjar fyrst í juli mánaði Grønland.

Grønlendski landsstýrisformaðurin, Jonathan Modzfeldt, og danski statsministarin, Poul Nyrup Rasmussen, eru vertir fyri vitjanina.

Prodi kemur til Grønlands 6. juli, og hann verður á heimsins størstu oyggj til 9. juli.

Á ferðini fer Prodi at hava fundi við grønlendskar politikarar um framtíðar samstarvið millum Grønland og ES, og hann fær eisini høvi at síggja grønlendsku náttúruna.



*Jonthan Modzfeldt og Poul Nyrup Rasmussen eru vertir fyri ferðini hjá Romani Prodi í Grønlandi*



# Nyrup væntar samráðingar í heyst

*Á fundi við donsku Føroya-nevndina mikudagin gjørdi danski forsætisráðharrin greitt, at hann er sinnaður at halda fram at samráðast við landsstýrið um fullveldi*

JOHN JOHANNESSEN

Danska stjórnin er sinnað at halda fram at samráðast við føroyingar um fullveldi. Men skiftistíðin verður ikki longri enn fýra ár.

Hetta gjørdi danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, sambært tíðindastovuni Ritzau greitt, tá hann mikudagin kunnaði Føroya-nevnd fólkatingsins um seinasta samráðingarfundin, ið varð hildin 15. juni.

Poul Nyrup Rasmussen staðfesti eisini enn einaferð, at hann ikki metir tað vera neyðugt at seta ein felags bólk av embætismonnum at meta um neyðugu longdina av búskaparligu skiftistíðini.

– Vit síggja onga serliga orsøk fyri at seta ein slíkan bólk. Hetta er ikki ein spurningur, man bara kann seta serfrøðingar at loysa. Ein rúgva av búskaparfrøðingum hava - eins og stjórnin - sagt, at fýra ár eru nóg mikið til, at føroyska samfelagið kann bera seg, segði Poul Nyrup Rasmussen eftir fundin.

Danski forsætisráðharrin vísti tó á, at stjórnin í løtuni kannar lógartøkninligu og verkligu avleiðingarnar av einum serligum føroyskum ríkisborgararætti og hvussu eitt gjaldoyrasamstarv millum Føroyar og Danmark skal skipast. Hetta arbeiðið skal vera klárt áðrenn fundin í heyst.

# Løgmaður fær álitisváttan



*Anfinn Kallsberg er besta boðið upp á løgmann, heldur føroyski veljarin*

JOHN JOHANNESSEN

Triðji hvør føroyingur heldur Anfinn Kallsberg vera besta boði uppá føroyskan løgmann.

Hetta sýnir nýggja veljarakanningin, Fynd júst hevur gjørt fyri Sjónvarpið og Sosialin.

Anfinn Kallsberg er langt fremstur millum teir tríggjar, føroyingar meta vera best egnaðir sum løgmenn. Hann fær stuðul frá 32 prosentum av teimum spurdu.

Næstur á listanum er Jóannes Eidesgaard. Hann fær stuðul frá 20 prosentum av teimum spurdu, meðan Høgni Hoydal liggur á einum triðja plássi við stuðuli frá 13 prosentum.

Helena Dam á Neystabø og Jenis av Rana eru sambært teimum spurdi ikki væl egnað sum løgmenn. Helena Dam á Neystabø fær einans stuðul frá 0,23 prosentum av teimum spurdu, meðan Jenis av Rana fær stuðul frá 1,58 prosentum.

Hóast Sambandsflokkurin hevur havt stóra framgongd seinastu tíðina, eru tað bert 7,2 prosent av teimum spurdu, ið meta formannin, Edmund Joensen, vera væl egnaðan sum Føroya Løgmann.

# Dagur og Vika aftur at síggja á netinum

*Útvarp Føroya hevur í longri tíð lagt tíðindasendingar sínar út á internetið, og tey bæði stóru bløðini hava eina enn longri internetsøgu. Nakað væl afturúrsiglt stevnir Sjónvarp Føroya nú endiliga aftur út á netið við sínum tíðindasendingum.*

RÚNAR REISTRUP



- Vit hava verið nøkur ár aftanfyri, og tað er kanska eitt sindur pínligt, at vit ikki gera tað fyrr enn nú, men vit mugu bara gleðast yvir at tað nú endiliga fer at henda okkurt, sigur Øssur Winthereig, leiðari á tíðindadeildini hjá SvF um, at tað komandi viku aftur fer at bera til at síggja Dag og Viku um internetið.

Sjónvarp Føroya hevur gjørt avtalu við internettænastuna Olivant um at fáa tíðindasendingar sínar á netið. Sambært avtaluni skal link vera frá Olivant til eina síðu, har møguleiki er at síggja Dag og Viku. Hetta er ein fyribilsloysn, sum í fyrstu atløgu skal virka fram til árskiftið, tá nýggja internettænastan hjá Sjónvarpinum sjálvum eftir ætlan skal vera komin á netið.

Fyrsta tíðindasending, ið kann síggjast frá Olivant, verður eftir ætlan hon, ið send verður komandi týskvøld.

**Sæð fyrr**

Hetta verður tó ikki fyrstu ferð at Dagur og Vika sæst ígjøgnum internetið. Tað er eftirhondini nakað síðan, at Hans Blaasvær av sínum eintingum legði bæði Dag og Viku og tíðindasendingarnar hjá Útvarpi Føroya út á egnu heimasíðu sína.
Eftir eitt sindur av roki um upphavsrættindi, varð avtala gjørd millum Hans Blaasvær og SvF um framhaldandi at senda tíðindasendingina á netinum. Seinni yvirtók SvF tænastuna, og tá hon stutt eftir datt niðurfyri, hendi ikki meira á tí økinum.

- Vit vildu ikki brúka nakað serligt av peningi upp á internettænastuna, og vit fara framhaldandi at vera varnir við at halda útreiðslunum til internetpartin niðri. Orsøkin er, at vit mugu minnast til, at sjónvarpsgjaldið, ið hyggjarar okkara gjalda, er ætlað til sjónvarp - ikki til internet, og tískil er tað umráðandi, at okkara íløgur í internettænastur ikki hava við sær, at minni verður í part til sjónvarpstænastuna, sigur Øssur Winthereig.

**Halda seg á jørðini**

Sjónvarp Føroya ætlar sær tískil heldur ikki fyribils út í nakað størri projekt á netinum.

- Vit arbeiða við at fáa eina nýggja internetsíðu, ið skal vera meira umfatandi enn tann núverandi. Men ambitiónirnar eru ikki størri enn so, at vit fara at royna at fáa internettænastuna til at bera seg fíggjarliga, samstundis sum hon kann vera eitt íkast til sjónvarpssendingarnar, sigur Øssur Winthereig, leiðari á tíðindadeildini hjá Sjónvarpi Føroya.

Sum er eingin peningur ímillum Olivant og Sjónvarp Føroya. Olivant hevur veitt ta teknisku loysnina og fær harafturfyri einasta linkið til tíðindasendingarnar.

Tað merkir, at øll, ið vilja síggja Dag og Viku á netinum, fyrst mugu framvið portalinum hjá Olivant, og tað verður so í fyrstu atløgu tann lønin, ið internettænastan hjá Føroya Tele fær fyri stríðið.


OFFSHORE NORTHERN SEAS
22. august kl. 14.00 til 25. august kl.12.00

ONS 2000 OFFSHORE NORHTERN SEAS

Á olju-ráðstevnu í Stavanger

petur & petur 320 870

Í sambandi við oljuráðstevnuna bjóðar Flogfelag Føroya hesar túrar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánakvøld | 21. august | kl. 17.30 | Vágar - Stavanger |
| Týsmorgun | 22. august | kl. 07.00 | Vágar - Stavanger |
| Hósmorgun | 24. august | kl. 10.00 | Stavanger - Vágar |
| Fríggjakvøld | 25. august | kl. 20.30 | Stavanger - Vágar |

Gist verður á "Barakkerne", á rúmi við bað/toilett.

"Barakkerne" liggur 6 min frá sentrum og 5 min frá messusentrinum. Bussur koyrir hvønn morgun og seinnapart til og frá ráðstevnuni.

**Kostnaður fyri gisting, flogferð og ferðagjald:**

**2 nætur kr. 5.450**
**3 nætur kr. 6.325**
**4 nætur kr. 7.200**

Aðrir upplýsingar um ráðstevnuna eru at síggja á www.ons.no

Um tygum ynskja at vera við, so set tygum í samband við okkum:
**e-mail travel@ff.fo • tlf 340 000 • fax 340 011**

FLOGFELAG FØROYA

Áarvegur 6 • P.O. Box 3225 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands